# Kykmyndir og myndir

Ein av myndamonnunum til dystin í Klaksvík var Jóannes N. Poulsen. Hann tók eina drúgva myndarøð í løtuni, tá avgerandi brotssparkið varð dømt. Á portalinum ber til at síggja hesa myndarøðina, og so kann lesarin sjálvur gera sína meting, um hetta var brotsspark ella ikki. Og sjálvandi ber eisini til at síggja kykmyndirnar frá dystinum eins og samrøður við spælarar.



# Gull til Eskild

Danir hava síðstu stóru vikuna longst eftir at vinna fyrstu gullmerkini í OL. Og í gjáramorgunin eydnaðist tað. Føroya vinurin Eskild Ebbesen og bátsfelagar hansara vunnu finaluna í lættvekt fyri fýra rógvarar. Millum teir fýra, sum mannaðu bátin, var Eskild Ebbesen, sum áður hevur luttikið í føroyskum kappróðri. Hetta var triðja OL gullmerkið, sum Eskild hevur vunnið. Eina ferð hevur hann vunnið bronsu. Danir høvdu vónað, at tað eisini skuldi eydnast lættvektaranum við tveimum rógvarum at vinna gull. Tað eydnaðist ikki. Danski báturin róði seg til bronsumerkini, sum tað sjálvandi eisini er fagnaður um.

KÍ-Víkingur 1-2 (0-1):

# Klaksvíkingar snýttir



*Klaksvíkingarnir trúðu ikki sínum eygnu oyrum, tá dómarin fyri aðru ferð bríksladi fyri brotssparki. Heldur ikki gestirnir tykjast reiðiliga at vita, hví blást verður, men tá møguleikin beyðst, var Sam Jacobsen maður fyri at taka av*

*Mynd: Jóannes N. Poulsen*

**Eftir ein fyrra hálvleik, har Víkingarnir hertóku Injector Arena, stríddi KÍ seg aftur í dystin. Men alt var til fánýtis, tá dómarin í yvirtíðini púrasat óskiljandi peikaði á brotsteigarblettin**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*KÍ*

*Víkingur*

Drama og dómaramistak. Tað munnu vera orðini, ið best lýsa tað, sum hendi seinastu løtuna av dystinum í Klaksvík millum KÍ og Víking.

Myndirnar, sum eru tiknar av hendingini, siga millum lítið og einki, tá rættleikin av avgerðini skal staðfestast. Ikki annað enn at talan er um luftdyst millum Rógva Jacobsen og Atla Gregersen. Og hóast Atli fór um koll í tvídystinum, var ikki ein tann einasti av spælarunum hjá Víkingi, sum appeleraði fyri einum dómi.

Tí var tað mest sum at biðja um rok, tá peikað varð á brotssparksblettin, og rokinum slapst heldur ikki undan. Áðrenn brotssparkið varð tikið, hevði KÍ fingið trý gul og eitt reytt kort.

Og so sóust Víkingarnir annars fegnast, tá Sam Jacobsen sendi brotssparkið í netið. Á knæ lógu eitt nú óhepnu hetjurnar, Geza Turi og Niclas Niclasen. Geza átti sín stóra leiklut, tá Heðin á Lakjuni javnaði fyri KÍ, og Niclas misnýtti gyltan møguleika at punktera dystin, tá hann brendi brotsspark ímóti barndómsfelagnum.

**Lítið um KÍ**

Fyrra umfarið var annars ikki tað stóra, sum bendi á, at talan skuldi gerast um nakran serliga dramatiskan dyst.

Klaksvíkingarnir hava verið sera sveiggjandi í ár, og dysturin hesa ferð tóktist vera ein av teimum heilt laku. Víkingarnir vóru hinvegin grammir, og teir settu seg eisini tungt á dystin. Ikki minst takkað verið einum sera góðum press-spæli á miðvøllinum, har Sølvi Vatnhamar sýndi stórspæl. Tað var kanska eitt sindur ímillum góðu møguleikarnar, men ta einu ferðini bankaði Atli Gregersen bóltin beint upp um eftir hornasparksstøðu, og aðru ferðina var sami spælari óheppin, tá flatt skot varð sent á stólparótina.

Málið kom tó beint fyri steðgin. Hanus Jacobsen sendi diagonalt av vinstra bakki, og so kuni Sam Jacobsen í flúgvandi stíli sneiða bóltinum innum.

**Intenst**

Eftir steðgin komu tó aðrir bollar á suppuna. KÍ-venjarin hevði helst givið sínum spælarum av grovfíluni, og teir fóru nú undir veruliga bjargingarroynd. Í størri mun vóru teir nú teir, sum trýstu mótstøðuna, og tó at Víkingur við kviku áleyparum sínum hevði nøkur góð kontra-vápn, so byrjaði tað at líkjast eini útjavning.

Um miðjan fyrra hálvleik kom eisini ein avgerandi støða. Andreas Lava Olsen smoygdi sær brádliga avstað, og tá beinini vórðu tikin undan honum í brotsteiginum, var bert eitt hjá dómaranum at gera.

Niclas Niclasen átók sær uppgávuna móti barndómsfelagnum, men Jákup Mikkelsen hevði lisið hann av, og so livdi KÍ enn. Og tá Geza Turi so droppaði, tá Heðin á Lakjuni stutt seinni legði bleytan frísparksbólt innfyri, hevði liðið eftir øllum at døma mist sín møguleika.

Og hóast heppið, so var útjavningin kanska ikki heilt óuppiborin. Í einum seinna hálvleiki, har intensiteturin og nærdystirnar vóru í hásæti, hevði KÍ veruliga strítt seg upp. Tað kostaði nógvar kreftir hjá øllum monnum, og meira enn eina ferð mátti dómarin fáa hjálparfólk á vøllin, tá spælarar venaðu seg eftir harðliga viðferð.

Í so máta gjørdist talan um undirhaldandi uppgerð, tó at spælið ikki var flótandi. Og spenningurin og dramatikkurin slapp altso at kóka yvir seinstu løtuna. Men tað er altíð keðiligt, tá dramatikkurin hevur sítt útgangsstøði í eini sera ivasamari dómaraavgerð. Og tað verður fyrst og fremst hendan, sum dysturin í Klaksvík verður mintur fyri.

## Hevði eisini mótmælt

Atli Gregersen, ið var maðurin, sum fekk tillutað brotssparkið í yvirtíðini í Klaksvík, segði soleiðis, tá vit spurdu hann, um hann helt talan vera um brotsspark.

- Eg ivist eitt sindur í, um tað var brotsspark. Men hann heldur í mær, og tí kann tað forsvarast at dømast.

- Talan er tó um eina av hesum støðunum, sum eru rættiliga vanligar við hornaspark og aðrar deyðbóltsstøður, og eg hevði heilt víst eisini sagt okkurt við Rúna (Gaardbo, blðm.), um brotsspark varð dømt ímóti mær í líknandi støðu. Men sum sagt, so kann tað helst verjast.

---

## Har var einki

Rógvi Jacobsen, sum fekk dømt brotssparkið í Klaksvík ímóti sær, hevði ilt við at skilja avgerðina, sum kostaði KÍ eitt stig í gjár.

- Har er einki. Eg haldi, at hann dømir fyri at halda, men har er altso einki sum helst.

- Vit høvdu annars ikki uppiborið nakað sum helst, um mett verður eftir fyrra hálvleiki, har vit als ikki eru klárir. Men vit stríða okkum væl aftur í dystin og skora eisini. Og so er tað sjálvandi tungt at góðtaka, at tú skalt missa stig á hendan hátt, segði Rógvi Jacobsen eftir dystin.

---

## Dagsins maður

Hjá Víkingi var Sam Jacobsen uttan iva dagsins maður sunnudagin. Og sjálvur var hann eisini ovurfegin um tey bæði málini, sum hann hevði syrgt fyri.

- Tað var deiligt at skora. Tað er jú nakað síðani, at eg havi royn tað, so hetta var bara fantastiskt.

*Tit høvdu tamarhald á tí mesta fyri steðgin. Gjørdust tit bilsnir av, at KÍ kom somikið væl fyri seg eftir steðgin?*

- Ja. Tað haldi eg. Teir stríða seg veruliga aftur í dystin, og seinni hálvleikur gjørdist ótrúliga harður. Og móti dystarenda sóust menn eisini hava krampa.

*Sjálvur vart tú ein av teimum, sum byrjaði at fáa krampa, men tú tókst kortini avgerandi brotssparkið. Ivaðist tú ikki, um tú skuldi taka?*

- Nei, ikki eitt sekund. Eg kendi meg púrasta vissan í, at eg fór at skora. Og tað gjørdi eg so tíbetur eisini, sigur Sam Jacobsen.